SPEKT | løggildir grannskoðarar

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2013

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Leiðslufrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	8
Átekning frá óheftum grannskoðara	9
Nýttar roknskaparreglur	11
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2013	13
Fíggjarstøða 31. desember 2013	14
Notur	16

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Telefaks: 35 35 81

Roknskaparár nr. 9

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Óluva J. Midjord, forkvinna
yrkislærd búnaðarkvinna

Marion á Lakjuni, næstforkvinna
cand.polit.

Niels Th. Pedersen
maskinmeistari

Magnus S. Petersen
løgfrøðingur

Anna Rubeksen
bóndi

Varalimir:

Arne Poulsen
verkfrøðingur

Durita R. Djurhuus
búskaparfrøðingur

Dánjal Jákup Andreasen
skipari

Elisabeth Eldevig
búskaparfrøðingur

Sigert Patursson
bóndi

Stjórn

Regin I. Jakobsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar

Bank Nordik
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Saxo Bank
Skandinaviska Enskilda Banken

Leiðslufrágreiðing

Virksemi

Endamál Búnaðargrunsins er at veita lán til landbúnaðin og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2013.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur, felagsfestipuljuna og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið

Inntøkurnar í 2013 eru 8.607 tkr. móti 12.271 tkr. árið fyri, og er hetta ein lækking upp á 3.664 tkr. Rentuinntøkur av útlánum vóru 5.532 tkr., av lánsbrøvum og avtaluinnlánum 2.783 tkr. og av innistandandi 6 tkr.

Rentuinntøkurnar av útlánum lækkaðu við 232 tkr. Inntøkurnar av lánsbrøvum og avtaluinnlánum lækkaðu við 3.143 tkr., meðan rentuinntøkurnar av innistandandi peningin lækkaðu við 201 tkr.

Lækkingin í inntøkunum stavar sostatt í høvuðsheitinum frá lánsbrøvum.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðu við 1.292 tkr., úr 8.003 tkr. í 2012 til 9.295 tkr. í 2013. Høvuðstølini í hækkingini eru rakstur av øðrum ognum við 654 tkr. og starvsfólkaútreiðslur við 394 tkr. Rakstur av øðrum ognum fevnir um ognir, sum grunnurin hevur keypt á tvingsilssølu. Talan er um Vakstrarhúsið í Sandavági, sum hevði eina inntøku á 180 tkr., Fjósið á Giljanesi við 802 tkr., Fjósið í Leirvík við 767 tkr. og Fjósið á Norðoyri við 41 tkr.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avsetingar móti tapi uppá skuldarar er eitt hall á 11.361 tkr. fyri 2013 móti einum halli á 3.222 tkr. í 2012. Hetta stavar frá omanfyri nevndu broytingum, umframt avsetingum móti tapi upp á 10.673 tkr. upp á útlán.

Útlánini eru lækkað við 15.625 tkr., úr 111.725 tkr. til 96.100 tkr., og kemur hetta av lækking í útlánum upp á 4.954 tkr. minus avsetingar upp á 10.673 tkr. umframt eini hækking í falnari festi- og traðarleigu upp á 2 tkr.

Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum góvu eina inntøku upp á 2.783 tkr. í 2013 móti 5.926 tkr. í 2012. Hetta er ein lækking upp á 3.143 tkr.

Viðmerkjast skal, at higartil í 2014 eru 353 tkr. komnar úr búnum eftir Lehman Brothers og eru hesar bókaðar í roknskapinum fyri 2013.

Verður hugt at talvunum niðanfyri kann sigast, at hóast úrslitið fyri 2013 ikki er av teimum bestu, hevur tað kortini verið ein skilagóð loysn at keypa lánsbrøv, bæði tá ið hugsað verður um avkast og trygd. Talvurnar vísa gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til ultimo 2013.



	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	Miðal
Ognarrøkt	5,80%	6,93%	4,30%	3,10%	3,00%	3,00%	3,60%	-0,06%	5,11%	2,02%	5,24%	4,28%	1,15%	3,65%
EFFAS 1-5	5,80%	7,00%	4,21%	4,50%	2,87%	0,74%	3,22%	3,19%	4,26%	4,11%	5,28%	1,16%	-0,48%	3,53%
Innlán	3,60%	2,95%	2,15%	2,15%	2,40%	3,19%	4,27%	4,81%	1,84%	1,06%	1,27%	0,43%	0,23%	2,33%



	Byrjan	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013
Ognarrøkt	100,00	105,80	113,13	117,99	121,65	125,30	129,06	133,70	133,62	140,45	143,29	150,80	157,25	159,06
EFFAS 1-5	100,00	105,80	113,21	117,97	123,28	126,82	127,76	131,87	136,08	141,87	147,71	155,50	157,31	156,55
Innlán	100,00	103,60	106,66	108,95	111,29	113,96	117,60	122,62	128,52	130,88	132,26	133,94	134,52	134,83

- Innlán (grønur litur) svarar til at peningurin varð settur á innlánskontur, við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.
- Effas 1 – 5 (reyður litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum okkara íløgur í lánsbrøv vera samanhildin við.
- Ognarrøkt (bláur litur) eru lánsbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2013 og miðal rentuna fyri sama tíðarskeið. DK Repo rentan hevur í miðal givið 2,33%, meðan lánsbrøvini hava givið 3,56% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av, hvussu nógvar krónur hvørt lánsbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2013. T.v.s. at lánsbrøvini hava givið 59,06 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 34,83 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Grunnurin er minkaður úr 111,1 mió.kr. til 99,7 mió.kr. og stavar munurin frá rakstrarúrslitinum.

Festikontan er minkað úr 201,6 mió.kr. niður í 159,1 mió.kr. Minkingin á 42,5 mió.kr. stavar fyri størsta partin frá stráfóðurstuðli, 24,7 mió.kr., stuðul til tjóðgarðsætlan, 6,0 mió.kr. og stuðul til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni, 5,1 mió.kr. Nettoútgjøldini av festikontu vóru 8,6 mió.kr. og útgjøldini av felags festipulju 2,2 mió.kr. Eisini stava 1,6 mió.kr. frá jarðarsølu og 1,3 mió.kr. frá endurgjaldi frá Landsverki.

Viðmerkjast skal, at av nevndu 159,1 mió.kr. hoyra 10,6 mió.kr. til kontu fyri mist vetrarbit. Eisini skal viðmerkjast, at lógin fyri vetrarbit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á kontu í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigaran. Eisini er lógin broytt soleiðis, at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting kemur at hava við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á kontu í Búnaðargrunninum fyri mist vetrarbit í framtíðini, sum undanfarin ár. Roknast kann eisini við størri útgjaldingum av kontu fyri mist vetrarbit komandi árini.

Eisini skal nevnast, at í upphæddini á festikontu upp á 159,1 mió.kr. eru 21,7 mió.kr., sum eru fluttar á felagsfestipulju sambært løgtingslóg nr. 66 frá 26. mai 2011 um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn. Fyri árið 2013 vóru 7,2 mió.kr. fluttar av festikontu til felagsfestipuljuna.

Mett verður, at hendan broytingin í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni, við tað at eisini festarar í útjaðaranum, har ikki er serliga nógv á festikonto, eisini fáa møguleikan at søkja um fígging av felagspuljuni. Eisini betrar felagsfestikontan um møguleikarnar at velta hjá mjólkarframleiðarunum.

Í 2013 eru sambært lóg játtaðar 24,7 mió.kr. úr Búnaðargrunninum yvir 6 ár, ella 4,1 mió.kr. pr. ár til studning til egið framleitt stráfóður. Hetta fyri at stuðla undir fóðurframleiðsluna og fyri at minka um útreiðslurnar til keypt fóðuri hjá bóndunum. Játtanin minkar um fæ grunsins, men eigur at betra um raksturin hjá mjólkarframleiðarunum.

Afturat hesum eru í 2013, sambært somu lóg, eisini játtaðar 5,1 mió.kr. úr grunninum til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði og 6 mió.kr. til tjóðargarðsætlanina í Koltri.

Hesar 11,1 mió.kr. eru játtaðar beinleiðis av fæi Búnaðargrunsins og minka alt annað líka um inntøkumøguleikarnar hjá grunninum, ella hækka um útlánsrentuna, um avkastið skal vera tað sama, sum áðrenn játtanina.

Í 2013 eru sostatt sambært lóg játtaðar til samans 35,9 mió.kr. í stuðli úr Búnaðargrunninum. Hesin peningur er í ársroknskapinum fyri 2013 fluttur av festikonti til onnur skuld.

Peningaviðurskifti:

Fíggjarjavnin er 297.658 tkr. Av hesum er eginpeningurin 258.809 tkr., sum svarar til 86,9 %.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri Búnaðargrunnin fyri 2013.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok 2013.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 5. juni 2014

Stjórn:

Regin I. Jakobsen

Stýrið:

Óluva J. Midjord
forkvinna

Marion á Lakjuni

Niels Th. Pedersen

Magnus S. Petersen

Anna Rubeksen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin / 2014

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum

Átekning á ársroknskapin
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2013 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rætta mynd í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Ábyrgd grannskoðarans
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðararlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparháttur, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Átekning frá óheftum grannskoðara

Niðurstøða
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2013 hjá Búnaðargrunninum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Tórshavn, hin 5. juni 2014
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin fyri 2013 er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Ársroknskapurin er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

Um innrokning og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Roknskaparligar metingar

Virðisásetingin av útlánum grunsins er tengd at metingum hjá leiðsluni um hvørja ávirkan framtíðar hendingar kunnu hava á virðið á útlánum.

Metingarnar hjá leiðsluni eru gjørdar við støði í teimum royndum, sum leiðslan hevur við lánsveiting til ymsar bólkar av lántakarum umframt fyritreytum, sum leiðslan eftir umstøðunum metir verða ráðiligar, men sum eru óvissar og torførar at siga nakað um.

Um fyritreytirnar, sum metingarnar byggja á, broytast ella um grunnurin fær nýggja vitan um ávís øki, kann tað fáa ávirkan á uppgerðina av roknskaparliga virðinum.

Rakstrarroknskapur

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Rentur av lánsbrøvum verða tíðargreinaðar til og við roknskaparárslok.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Nýttar roknskaparreglur

Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um partafelagsskatt og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á egiognina.

Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán verða í fyrstu atløgu innroknað til dagsvirði svarandi til útgoldnu lánsupphæddina (við ískoyti av stovningarprovisión).

Útlán og eftirstøður verða síðani virðisásett til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum móti væntaðum tapum.

Niðurskrivað verður til tap upp á eitt útlán, tá ið tað eru óvildugar ábendingar um, at eitt lán er minkað í virði.

Óvildugar ábendingar um eina virðusminking kunnu m.a. vera eftirstøða á lánum, lækkandi rakstrarúrslit og/ella niðurgongd innan eina ávisa vinnugrein.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Skyldugur skattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Skuld

Skuld verður upptikin til áljóðandi virði.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2013

	Nota	2013	2012
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	184.331	224.473
Rentuinntøkur v.m.	2	8.321.203	11.897.167
Sakarmálsgjøld		100.999	149.266
Inntøkur til samans		8.606.533	12.270.906
Umsiting	3	-1.558.611	-1.518.838
Húsarakstur	4	-245.638	-194.040
Starvsfólkaútreiðslur	5	-3.032.773	-2.638.285
Innbúgv v.m.	6	-198.264	-33.811
Rakstur av øðrum ognum	7	-1.430.125	-776.470
Búnaðarstovan		-2.829.793	-2.842.053
Úrslit áðrenn avsetingar		-688.671	4.267.409
Javning í avseting til tap upp á skuldarar		-10.672.812	-7.489.227
Úrslit áðrenn skatt		-11.361.483	-3.221.818
Skattur av ársúrslitinum		0	0
Ársúrslit		-11.361.483	-3.221.818

Fíggjarstøða 31. desember 2013

	Nota	2013	2012
		kr.	kr.
OGN			
Ogn í umferð			
Áogn			
Útlán og eftirstøður	8	96.099.885	111.725.079
Onnur áogn	9	59.931	1.167.854
		96.159.816	112.892.933
Lánsbrøv		181.533.193	188.083.471
Tøkur peningur	10	19.965.341	14.559.276
Ogn í umferð til samans		297.658.350	315.535.680
OGN TIL SAMANS		297.658.350	315.535.680

Fíggjarstøða 31. desember 2013

	Nota	2013	2012
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginogn			
Grunnurin	11	99.705.829	111.067.312
Festikontur	12	159.086.059	201.609.535
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginogn til samans		258.808.691	312.693.650
Skuld			
Langfreistað skuld			
Onnur skuld	13	12.359.688	0
Stuttfreistað skuld			
Onnur skuld	14	26.489.971	2.842.030
Skuld til samans		38.849.659	2.842.030
SKYLDUR TIL SAMANS		297.658.350	315.535.680
Veðsetingar og trygdarveitingar	15		
Eventualognir	16		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2013	2012
	kr.	kr.
Festileiga	29.747	28.875
Traðarleiga	120.584	117.598
Festigjøld við skifti	34.000	78.000
	184.331	224.473

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.809.894	4.277.134
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	2.782.992	5.926.058
Rentur av innistandandi peningi o.a.	6.281	206.633
Rentur av eftirstøðum	1.722.036	1.487.342
	8.321.203	11.897.167

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	-1.200	-400
Løgfrøðilig og serkøn hjálp	1.047.583	895.116
Innheintingarkostnaður	0	2.943
Postgjald	2.020	18.225
Grannskoðan	112.000	93.500
Roknskaparhjálp v.m.	80.180	17.000
Vistir	76.888	31.047
Tinglesing	-57.350	29.525
Ymiskt	273	70.295
Tryggingar	10.181	0
Námsferðir	0	9.870
Edv-útreiðslur	54.144	129.607
Bókaútgáva	349	-9.832
Telefon	72.758	71.704
Internet	33.116	26.162
Haldaragjald, bløð o.a.	37.701	26.450
Aðrar skrivstovuútreiðslur	89.968	107.626
	1.558.611	1.518.838

Notur

4 Húsarakstur

	2013	2012
	kr.	kr.
Viðlíkahald	5.510	9.245
Reingerð o.a.	61.547	62.245
Ljós og hiti	46.708	52.608
Tryggingar	57.890	21.022
Urtagarðurin	48.945	24.920
Kavarudding v.m.	10.238	9.600
Ávaringarskipan	14.800	14.400
	245.638	194.040

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	2.082.302	1.846.797
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	63.703	48.071
Arbeiðsloysistrygging	49.734	43.857
Barsilsskipanin	21.911	18.817
Eftirlønargjald	300.449	262.157
Lønir og lønargjøld til samans	2.518.099	2.219.699
Dagpeningur, Stýrið	475.095	392.515
Ferðapeningur, Stýrið	39.579	26.071
	3.032.773	2.638.285

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	198.264	33.811
	198.264	33.811

7 Rakstur av øðrum ognum

Vakstrarhúsið í Sandavági	-180.000	10.650
Fjósið á Giljanesi	802.030	647.644
Fjósið á Norðoyri	41.183	118.176
Fjósið í Leirvík	766.912	0
	1.430.125	776.470

Notur

8 Útlán og eftirstøður

	2013	2012
	kr.	kr.
Ymiskar útlánskontur	126.252.041	133.639.306
Avdráttir og rentur, fallið til gjaldingar	49.696.702	47.263.532
Fallin festi- og traðarleiga	102.936	101.100
Niðurskriving til tap	-79.951.794	-69.278.859
	96.099.885	111.725.079

9 Onnur áogn

Mvg-áogn	10.905	605.573
Onnur áogn	49.026	562.281
	59.931	1.167.854

10 Tøkur peningur

Kassapeningur	1.408	1.365
Bank Nordik	13.267.909	11.819.185
Eik Banki	1.565.568	802.054
Suðuroyar Sparikassi	116.695	104.648
Norðoya Sparikassi	395.588	251.250
Landsbankin	0	83.359
Saxo Bank	3.691.791	123.613
Skandinaviska Enskilda Banken	432.885	997.041
Postgiro	493.497	376.761
	19.965.341	14.559.276

11 Grunnurin

Salda 1. januar	111.067.312	114.289.130
Rakstraravlop	-11.361.483	-3.221.818
	99.705.829	111.067.312

Notur

12 Festikontur

	2013	2012
	kr.	kr.
Salda 1. januar	201.609.535	199.820.496
Søla av jørð	1.632.553	2.864.984
Inngoldið fyri vetrarbit	67.358	96.848
Inntøka av grótbrotum	578.403	359.587
Flutt av festikontum til felagsfestipulja	7.237.710	8.949.332
Flutt til felagsfestipulju av festikontum	-7.237.710	-8.949.332
Endurgjald frá Landsverk	1.262.443	0
Leiga	495.903	398.766
Alistøðir	119.141	143.074
Flutt stráfóðurstuðul til onnur skuld	-24.719.375	0
Flutt stuðul til tjóðgarðsætlan til onnur skuld	-6.000.000	0
Flutt stuðul til ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni til onnur skuld	-5.147.766	0
	169.898.195	203.683.755
Nettoútgjøld (felagsfestipuljan ikki við)	-8.623.603	-956.229
Felagsfestipulja	-2.188.533	-1.117.991
Festikontur 31. desember	159.086.059	201.609.535

13 Onnur skuld (langfreistað)

Stráfóðurstuðul, jb. lógtingslóg nr. 34	12.359.688	0
	12.359.688	0

14 Onnur skuld (stuttfreistað)

Stráfóðurstuðul, jb. lógtingslóg nr. 34	12.359.688	0
Búnaðarstovan – tjóðargarðsætlan í Koltri, jb. lógtingslóg nr. 34	6.000.000	0
Búnaðarstovan – ábøtur á bygningar jb. lógtingslóg nr. 34	5.147.766	0
Búnaðarstovan – rakstur	2.829.792	2.842.030
Grannskoðan, roknskaparhjálp o.a.	152.725	0
	26.489.971	2.842.030

15 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.

Notur

16 Eventualognir

Grunnurin hevur við árslok 2013 eina møguliga skattaáogn á 2.045 tkr.